**Bøgebladlus** *Phyllaphis fagi*

Tórshavn 18.06.2018

Eitt lúsaland hjá *Phyllaphis fagi* á Svínaryggi 🙂
Náttúran er heilt fantastisk - bara eitt einasta blað á eini bók kann hava eitt heilt samfelag av blaðlúsum búgvandi.
Um hesa tíðina síggjast hvítir lodnir plettar á undirsíðuni á bløðum á bókini. Hyggur man nærri, sær man, at hesi lodnu flyta seg og at har eru fleiri aðrar verur á sama blaði - tað eru veingaleysar honir, og smáir ungar (nymfer) sum drøna aftur og fram. Har eru eisini løgnar kúlur, og tað er eitt slag av sukurkúlum, sum "bøgebladlus" ger.
Einar 15-20 nymfur koma undan hvørjari lús, og tær leggja ungar stutt eftir, at tær sjálvar eru føddar. Alt hendir innan fáar dagar, so bølið hevur nógv ættarlið og vaksur skjótt. Alt er honir, tí hesa tíðina hava tær ikki brúk fyri nøkrum mannfólki, og tær halda sum oftast til á sama blaði alt lívið. Skuldi tað gjørst ov trongt, fær ein hon bara nakrar veingir, og flytur á eitt annað blað at búgva. Seint á heysti, verða nakrir hannar føddir, og teir flúgva so út í ta stóru verð og finna sær eina veingjaleysa hon og tryggja, at alt hetta heldur fram komandi summar.
Øll eru samd um, at man ikki skal brúka eitur móti blaðlúsum, tí tá oyðileggur man vistskipanina í garðinum. Man skal bara spula lýsnar av eina ferð um dagin, tí so detta tær niður á jørðina, har ein rúgva av øðrum verum standa klárar at hapsa tær.
Nógv flogkykt liva av blaðlúsum - m. a. blómufluga, gulleyga og snultivespa.
E.S. Blaðlýs eru sum oftast fullar av eitri frá plantunum, tær liva av, og "bøgebladlus" er einki undantak. Tó er hon ovast á kostpyramiduni hjá m. a. mariuhønuni, sum er so smart, at hon upphópar eitrið, og brúkar tað til egna verju.
Fyri at gera tað uppaftur betri, so hevur bøgebladlus sín egna her av meyrum, sum verjir tær móti øðrum kyktum, tí meyrurnar elska lekru sukurkúlurnar, sum koma undan lúsini og vilja ikki hava nakran annan at fara avstað við teimum 😃
Hetta síggja vit tó ikki her heima (enn), tí vit hava ongar meyrur - hóast onkur stundum heldur seg hava sæð tær.
http://www.jenskjeld.info/FO_side/flogkykt.htm







Skriv á Facebook